

# Effo søkir skrivstovunæming

Til høvuðsskrivstovu okkara í Tórshavn, verður søkt eftir skrivstovunæmingi.

Vit vænta okkum ein næming, sum er fyrikomandi, er vanur at arbeiða við teldu, hevur góð samstarvsevni og dugir at arbeiða sjálvstøðugt. Umsøkjari við HH prógvi hevur fyrimun.

Vit bjóða eitt lærupláss við fjøltáttaðum uppgávum og góðum arbeiðsumhvørvi.

Í lærutíðini fært tú upplæring innan alt vanligt skrivstovuarbeiði og kemur eisini at hava nakað av sambandi við Fasthandlar.

Seinasta freist at senda inn umsókn við prógvum og møguligum ummælum er 10. desember 2010.

Umsóknir vera at senda til :

**Effo Pf.**
**Postboks 3098**
**FO-110 Tórshavn**
**Att. Rasmus Joensen**

ella sum teldupost til: **raj@effo.fo**

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Rasmus Joensen á telefon 34 35 00.

effo føroya orkufelag

**Effo Pf.** Postboks 3098 110 Tórshavn Tel +298 34 35 00 www.effo.fo

# Móttøkufólk til BankNordik

BANKNORDIK

**BankNordik sóknast eftir einum móttøkufólki til høvuðssæti bankans í Húsagøtu í Tórshavn. Sum móttøkufólk verður tú fyrsta andlitið, sum viðskiftafólk bankans koma í samband við og sum bjóðar teimum vælkomin í bankan.**

Talan er um eitt fulltíðarstarv og umframt uppgávuna sum móttøkufólk kunnu væntast fyrisitingarligar uppgávur fyri vinnudeildina og íløgudeildina.

Uppgávur annars eru at taka ímóti viðskiftafólkum, sum koma inn í bankan í Húsagøtu og avgreiða viðskiftafólk í telefonini.

Vilt tú vita meira, kanst tú venda tær til Rune Nørregaard, leiðara á stjórnarumsitingini, á telefon 330 330 ella á run@banknordik.fo.

**Umsóknarfreistin er mánadagin 6. desember 2010.**

Send tína umsókn við avritum av CV og viðkomandi skjølum til: BankNordik, Húsagøta 3, Postboks 3048, 110 Tórshavn, Att. Starvsfólkadeildin ella til starvsfolk@banknordik.fo.

**Les meira á www.banknordik.fo/starv**

SENDISTOVAN

Maskinmeistari | Maskinistur | Skipari | Skipsførari

# Spennandi útbúgvingar
## - eitt hav av vinnumøguleikum

**Nýtt skúlaár byrjar 3. januar 2011. Umsóknarfreistin er 1. desember 2010**



**Maskinmeistari**
Maskinmeistaraútbúgvingin er mest fjølbroytta og hægsta tekniska yrkisútbúgving, sum kann takast í Føroyum. Útbúgvingin gevur sera stórar møguleikar, bæði á sjógvi og landi, líkamikið um tað er í Føroyum ella úti í heimi. Maskinmeistaraútbúgvingin gevur eisini møguleikar fyri at blíva elinnleggjari. Eisini í oljuvinnuni eru maskinmeistarar størsti einstaki yrkisbólkurin. Útbúgvingin tekur 3 ár.

Upptøka til maskinmeistaraútbúgvingina verður í januar og í august í 2011.

**Maskinistur**
Maskinistútbúgvingin gevur møguleikar fyri at vera maskinstjóri á flestu veiðiførum, sum fiska á føroyskum sjóøki. Útbúgvingin gevur t.d. eisini rætt til at vera maskinstjóri á skipum við maskinorku upp til 3000 kW í altjóða sigling. Útbúgvingin tekur 9 mánaðir.

Upptøka til maskinist verður í august í 2011. (Umsóknarfreist er 1. juni 2011).

**Skipari**
Vinnuháskúlin bjóðar altjóða góðkendar útbúgvingar til skipara og skipsførara, sum geva vinnumøguleikar á sjógvi og landi um allan heim. Sum skipari kanst tú føra øll fiskiskip um allan heim, eins og farmaskip, upp til 3.000 tons.

Skiparaútbúgvingin tekur hálvtannað ár. Tá ið tú hevur staðið skipara, kanst tú fara beinleiðis til skipsførara.

Upptøka til skipara verður í januar og í august í 2011.

**Skipsførari**
Skipsføraraútbúgvingin tekur tilsamans 3 ár; 3 hálvár til skipara og síðani 3 hálvár til skipsførara. Sum skipsførari kanst tú føra øll skip á øllum høvum.

Upptøka til skipsførara verður í januar og í august í 2011.

Maskinmeistara-, skipara og skipsføraraútbúgvingarnar eru moduluppbygdar.

Hevur tú hug at gerast maskinistur, maskinmeistari, skipari ella skipsførari? Set teg so í samband við skúlan, so senda vit tær upplýsingar um upptøkutreytir og lesturin saman við umsóknarblaði.

Umsóknarblað kann eisini heintast á heimasíðu okkara: **www.vh.fo**

VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Vinnuháskúlin er ein nútímans skúli við serkønum lærarum í øllum lærugreinum, eins og skúlin hevur allar teir hentleikar og útbúnað, sum skulu til fyri at gera útbúgvingina áhugaverda og góða. Útbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum eru góðkendar av Føroya Landsstýri, Søfartsstyrelsen og IMO.

Postboks 104 · FO-110 Tórshavn · Tel 350 250 · Faks 350 251 · info@vh.fo · www.vh.fo

KREA · TEL 60 80 80